## Frem gleðir seg til Løkin

Bogi Løkin fer í vár at spæla við danska Frem, og har sigur venjarin, Christian Andersen, at hann gleðir seg at fáa nýggja spælaran í hópin. - Hann eitur Bogi, og hann hevur enn ikki spælt í donskum fótbólti, men eg vænti mær nógv av honum. Hann spælir eisini á føroyska landsliðnum, har hann er fastur fúsur hvønn tann einasta dyst, sigur Christian Andersen millum annað við danska Ekstra-Blaðið.



## Ronaldinho droymir um HM

Hóast hann einki hevur hoyrt frá landsliðsvenjaranum seinastu átta mánaðirnir, so hevur brasilski Ronaldinho ikki slept dreyminum um at vinna enn eitt HM-heiti. – Tað gongur væl í Italia. Nú havi eg verið her í eitt ár, og eydnast tað okkum at vinna nakað við Milan, betrar tað eisini mínar møguleikar at koma til HM-sigur Ronaldinho. Í heyst hevur hann skotið fimm mál og lagt upp til átta fyri AC Milan, sum í løtuni er nummar tvey í Seriu A.

# Vil keypa Real Madrid

**Alt er til sølu, um prísurin er tann rætti. Tað er í øllum førum fatanin hjá Sheikh Mansour Bin Zayed Al Nahyan, sum sigst vera til reiðar at keypa sjálvasta Real Madrid**




Jákup Mørk



Milliardirnar sita leys hjá ríka Mancester City-eigaranum. Nú sigst hann vera til reiðar at keypa Real Madrid

Sheikh Mansour Bin Zayed Al Nahyan hevur longu sum er brúkt milliardir í royndunum at fáa Manchester City at teljast millum bestu feløg í heiminum. Og hóast tað enn er langt á mál, eru tær royndirnar sum so ikki steðgaðar.

Samstundis hevur milliarderurin tó eisini aðrar ætlanir innan fótbóltin. Í øllum førum sigst hann vera til reiðar at keypa spanska Real Madrid, sum eftir metkeyp síni í summar nú hevur eina skuld upp á 2,4 milliardir krónur.

Tað er ein upphædd, sum kann hótta framtíðina hjá felagnu, um neyðugu úrslitini ikki vísa seg á vøllinum, og Al Nahyan sigur seg vera til reiðar at rinda verandi partaeigarum íalt 7,5 milliardir fyri partabrøv síni.

Tað er tó ikki víst, at handilin verður til nakað. Stórur partur av partaeigarunum eru trúgv viðhaldsfólk hjá Real Madrid, og tey vilja alt annað enn fegin síggja kongaliga felagið umskapast til leikutoy hjá einum av heimsins ríkastu monnum.

Samstundis elvir hetta eisini til høvuðbrýggj hjá viðhaldsfólkunum í Manchester. Tað er nevnliga í stríð við UEFA-reglurnar, um sami eigari eigur fleiri feløg, og tí eru leysatíðindini kanska eisini úrslit av, at ríkmaðurin longu nú er troyttur av enska leikutoyi sínum.

# Fabregas og Rooney eftir Chelsea

**Chelsea kom illa avstað í tætt pakkaðu jólaskránni, og so tóku Cesc Fabregas og Wayne Rooney av**




Jákup Mørk

Teir báðir gjørdust stóru hetjurnar sunnudagin, eftir at Chelsea annan jóladag hevði snávað við málleysum javnleiki á útivølli móti Birmingham.

Tað var annars ikki júst tað, sum lá í kortunum hjá Fabregas. Beint undan dystarbyrjan móti Aston Villa varð staðfest, at spaniólin ikki var førur fyri at spæla týðandi dystin, men hóast hetta, so helt Wenger gimsteinin hjá sær á beinkinum, sum jokara.

Og hetta var ein skilagóð avgerð. Fabregas kom inn, tá tað eftir knappan tíma framvegis var málleyst, men hetta skuldi skjótt broytast. Fyrst sendi hann fríspark beinleiðis í netið, og síðani endaði hann sera vakurt kontra við at skora til 2-0. Eitt mál, sum tíverri eisini bar við sær, at skaðin hjá Fabregas versnaði, og tí mátti hann av aftur vøllinum. Og sum áskoðari kundi hann síggja Diaby staðfesta sigurin við málinum til 3-0.

Wayne Rooney noyddist eisini fyrst ígjøgnum leiklutin sum klovn, áðrenn hann gjørdist stóra hetjan í Manchester.

Rooney skoraði annars beint undan steðginum til 1-0 móti Hull, men hann átti eisini eina út av lagi vánaliga afturleggin, sum bar við sær, at Hull kundi javna við brotssparki.

Rooney var tó ikki liðugur. Eitt innlegg frá honum endaði í málinum sum sjálvmál, og síðani kundi hann sera hegnisliga spæla Berbatov púrasta leysan, so hesin kundi staðfesta sigurin.

Við sigrunum eru tey bæði liðini ávíkavist tvey og fýra stig aftan fyri Chelsea. Og tá hevur Arsenal enntá ein dyst tilgóðar í oddastríðnum, sum brádliga er vorðið nógv tættari, enn útlit vóru til fyri bara tveimum vikum síðani.

### Premier League

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 19 | 13 | - | 3 | - | 3 | 43 | 15 | 28 | 42 |
| 2 Man Utd. | 19 | 13 | - | 1 | - | 5 | 40 | 18 | 22 | 40 |
| 3 Arsenal | 18 | 12 | - | 2 | - | 4 | 47 | 20 | 27 | 38 |
| 4 Aston Villa | 19 | 10 | - | 5 | - | 4 | 29 | 17 | 12 | 35 |
| 5 Tottenham | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 40 | 22 | 18 | 34 |
| 6 Man City | 18 | 8 | - | 8 | - | 2 | 35 | 27 | 8 | 32 |
| 7 Liverpool | 19 | 9 | - | 3 | - | 7 | 36 | 25 | 11 | 30 |
| 8 Birmingham | 19 | 8 | - | 5 | - | 6 | 19 | 18 | 1 | 29 |
| 9 Fulham | 18 | 7 | - | 6 | - | 5 | 23 | 17 | 6 | 27 |
| 10 Sunderland | 19 | 6 | - | 4 | - | 9 | 26 | 29 | -3 | 22 |
| 11 Stoke | 18 | 5 | - | 6 | - | 7 | 15 | 22 | -7 | 21 |
| 12 Blackburn | 19 | 5 | - | 5 | - | 9 | 18 | 33 | -15 | 20 |
| 13 Burnley | 19 | 5 | - | 5 | - | 9 | 22 | 38 | -16 | 20 |
| 14 Everton | 18 | 4 | - | 7 | - | 7 | 24 | 32 | -8 | 19 |
| 15 Wolves | 19 | 5 | - | 4 | - | 10 | 17 | 33 | -16 | 19 |
| 16 Wigan | 18 | 5 | - | 4 | - | 9 | 21 | 39 | -18 | 19 |
| 17 West Ham | 19 | 4 | - | 6 | - | 9 | 28 | 35 | -7 | 18 |
| 18 Bolton | 17 | 4 | - | 5 | - | 8 | 24 | 34 | -10 | 17 |
| 19 Hull | 19 | 4 | - | 5 | - | 10 | 18 | 40 | -22 | 17 |
| 20 Portsmouth | 19 | 4 | - | 2 | - | 13 | 17 | 28 | -11 | 14 |

## Jólaskráin

**26. desember**

| | |
|---|---|
| Birmingham-Chelsea | 0-0 |
| Fulham-Tottenham | 0-0 |
| West Ham-Portsmouth | 2-0 |
| Burnley-Bolton | 1-1 |
| Manchester City-Stoke | 2-0 |
| Sunderland-Everton | 1-1 |
| Wigan-Blackburn | 1-1 |
| Liverpool-Wolves | 2-0 |

**Sunnudagin**

| | |
|---|---|
| Arsenal-Aston Villa | 3-0 |
| Hull-Mancester United | 1-3 |

**Mánadagin**

Tottenham-West Ham
Blackburn-Sunderland
Chelsea-Fulham
Everton-Burnley
Stoke-Birmingham
Wolves-Manchester City

**Týsdagin**

Aston Villa-Liverpool
Bolton-Hull

**Mikudagin**

Portsmouth-Arsenal
Manchester United-Wigan